# rúsur



fer jú fyri skeyti, um onki pláss longur er eftir hjá lesaranum at gera sær sínar egnum myndir og tankar, sigur Sólrún Michelsen, sum sjálv heldur tað vera munandi meir spennandi, tá ein ritøvundi skrivar sín iva heldur enn svar inn í søguna.

– Eg vil sleppa at tyggja søguna sjálv, fáa bein í hálsin, spíta steinar út og hava kjøt sitandi eftir millum tennirnar. Eg tími ikki at lata mær lynda við einum glasi av tunnari saft, sum bara glíður niðurum, uttan at leggi merki til tað ella minnist smakkin, sigur Sólrun Michelsen, sum roynir at flyta síni krøv til skaldskap yvir á sína egnu skriving.

Og í nógvar mátar er *Tema við slankum* eitt paradís hjá lesarar-um, sum sjálvir vilja sleppa at tyggja og gruna yvir, hvat gongur fyri seg - millum reglurnar. Serliga í fyrsta partinum av bókini er málið barberað so tætt, at hvørt einasta orð mest sum stendur til at bresta av týdningum.

**Eg øtist serliga, tá onkur sigur seg minnast onkra hending í bókini, sum eg veit, er mín egni heilaspuni**

– Hatta er ein av fyrimununum við at lata sjónarhornið í eini søgu liggja hjá barninum. Børn góðtaka tað mest ótrúliga og staðfesta bara, at soleiðis er tað. Úrslitið verður ein fatalistisk og nærum ræðandi neyv fatan av heiminum, sum fær alt tað ósagda at duna onkustaðni í høvdinum á okkum vaksnu, sigur Sólrún Michelsen, sum eisini í restini av bókini hevur verið sera tilvitað um málið sum skaldsligt snildi.

Eftirhondini sum børnini í bókini gerast vaksin, fylgja eisini meir realistiskar frágreiðingarnar um, hvat í veruleikanum gekk fyri seg ímillum reglurnar í fyrsta parti. Og tá teir sannleikarnir gerast ov beiskir at svølgja, flýggja tey vaksnu inn í hvør sína marru-ella dreymakendu søgu í einum ævintýrkendum málsligum búna, har allar hurðar aftur standa á gloppi.

## Opinberingar

Spælið við ymsar frásøguhættir tykist vera ein týðandi drívmegi í bókini. Og Sólrún Michelsen viðgongur eisini fegin, at hon sjálv fyrst og fremst lesir aðrar høvundar fyri at uppdaga og læra nýggjar frásøguhættir. Beint nú er hon á rannsóknarferð í bókunum hjá so ymiskum høvundum sum Jose Saramago, Margaret Atwood, Kafka og Einari Már Guðmundsson. Men hóast Kafka hevur fylgt henni í mong ár eftirhondini, læsir Sólrún Michelsen seg helst ikki ov fasta í ávísar høvundar.

– Tað kennist sum ein opinbering, hvørja ferð eg renni meg í ein nýggjan, góðan høvund, sum hevur sín heilt egna og øðrvísi máta at siga eina søgu. Einaferð fekk eg tað ráðið, at lesa virðisløntu høvundarnar og síðani royna at finna út av, hví teir høvdu fingið virðisløn. So systematisk eri eg kanska ikki, tá eg lesi, men tað kann vera ótrúliga inspirerandi at hava tað í huganum, sigur Sólrún Michelsen, sum illa dugir at ímynda sær eitt lív uttan bøkur.

– At lesa hevur altíð verið sum ein rúsur, sum eg kundi hvørva inn í, tá eg vildi. Og síðani eg sjálv byrjaði at skriva, havi eg í grundini bara funnið eitt nýtt rúsevni. Tað kennist so deiligt innaní, tá eg skrivi, at eg allatíðina vil hava meir. Gongur tað ov long tíð ímillum verði eg rastleys og fái ikki frið á mær. So jú, eg má nokk viðganga, at eri vorðin bundin av hesum, smílist Sólrún Michelsen í tí hevur hug at argast inn á, at tað er ov langt millum rúsirnar.

– Eg eri nokk vorðin meir sjálvkritisk við árunum. Tí er upplivingin av, at skrivingin mest sum bara flýtur av sær sjálvum, eisini vorðin meir forkunnug, sjálvt um eg framvegis tvíhaldi um, at skrivingin helst skal vera so spontan, sum til ber, sigur hon.

**Satt at siga helt eg, at bókin »Tema við slankum« langt síðani var gloymd**

Klók av royndum er Sólrún Michelsen nevniliga sannførd um, at tað ikki ber til at planleggja seg fram til eina góða søgu.

– Eg skrivaði einaferð eina ungdómsbók, har eg hevði lagt søgugongdina til rættis niður í minsta smálut, áðrenn eg byrjaði. Bókin bleiv eisini liðug, tupulleikin var bara, at søgan fungeraði yvirhøvur ikki. Tí liggur hon framvegis í skrivaraborðskuffuni, har hon kann gera eitt sindur av nyttu sum ávaring um, eg ikki skal planleggja ov nógv, tá eg skrivi, sigur høvundurin avgjørd.

## Antennnurnar úti

Hví Sólrún Michelsen yvirhøvur av fyrstan tíð byrjaði at skriva, dugir hon ikki rættiliga at siga. Ikki annað enn at henni altíð dámdi væl at skriva stílar í skúlanum, og at kanska eitt lítil neisti bleiv kveiktur, tá lærarin plagdi at lesar hennara stílar upp.

Ella hava tey sum kenna hana kanska rætt, tá tey siga, at hon altíð hevur so nógvar antennur úti, at tað ikki er so løgi, at øll inntrykkini mugu sleppa út onkursvegna.

– Jú, tað er nokk rætt at leggi til merkis og minnist nógv, sum onnur ikki hava givið sær stórvegis far um. Til tíðir kann tað vera strævið og uttan iva kanst tú eisini gerast heldur viðbrekin, um tú tekur alt inn og goymir tað har. Men tað kann eisini vera ein ótrúlig styrki at vita, at tú altíð kanst taka hesi inntrykkini framaftur og brúka tey til, hvat sørin tú vilt. Til dømis í eini ordiliga góðari søgu, sigur Sólrún Michelsen og smílist eitt sindur loyndarfull.









